## Frítíðarskúlin í Nes Kommunu

# Hjálparfólk

Søkt verður eftir hjálparfólki at arbeiða 30 tímar um vikuna í Frítíðarskúlanum í Nes Kommunu.

Frítíðarskúlin heldur til á Brekkukletti 5. Og er normeraður til 40 børn.

**Vit bjóða**
Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum. Dentur verður lagdur á at veita børnunum eitt trygt og mennandi frítíðartilboð.

**Vit ynskja**
- At tú megnar at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrum og starvsfeløgum
- At tú ert álítandi, hevur góð samstarvsevni og kanst taka ábyrgd.

**Setunarviðurskiftir**
Starvið verður sett 16. oktober 2006. Løn smb. Sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Eydnu Olsen tlf. 448786 ella 565023

**Umsøkn**
Skrivlig umsøkn, saman við prógvum og møgulig-um viðmælum, skulu vera Nes Kommunu í hendi innan 20. september 2006 kl.12.00.

**Nes Kommuna**
650 Toftir
www.nes.fo · nes@nes.fo

Advokatskrivstovan
Fr. Petersensgøta 9 · Postbox 6 · FO-110 Tórshavn
Tel (298) 311145 · Fax (298) 311525 · www.jura.fo

## Skrivstovufólk

Søkt verður eftir advokatskrivara/fólki við skrivstovuútbúgving fyri skrivara í farloyvi at byrja 1. oktober 2006 ella skjótast tilber.

Talan er um 3/4- tíðar starv, sum møguliga verður økt til fulla tíð eftir avtalu.

Viðkomandi, sum settur verður, skal hava hollan kunnleika til føroyskt og danskt í skrift og talu umframt ávísan kunnleika til enskt mál.

Løn sambært avtalu.

Nærri upplýsingar um starvið fáast frá undirritaðu

**Advokatskrivstovan**
**Fr. Petersensgøta 9**
**100 Tórshavn**
**Tel. 311145**
**www.jura.fo**
**att: Fríða Patursson, adv. (frp@jura.fo)**

Sosialurin 341800

# Kvinnufelagið

Aðalfundur verður **hóskvøldið** 21. september kl. 20.00 í Mettustovu. Uppskot til aðalfundin skal nevndin hava í seinasta lagi 14. september.

Er aðalfundurin ikki viðtøkuførur, verður eyka-aðalfundur hildin beint aftaná.

**Kvinnufelagið**

## Bátur til sølu:

Eitt stórt 8 mannafarð í góðum standi við fiskiloyvið.
Báturin hevur alla útgerð, eisini línuspæl og hydrauliskar snellur.
Báturin má síggjast.
***Prísur 100.000 kr.***

*Áhugaði kunnu ringja á tlf 75 67 87 ella 21 67 96*



Sosialurin
www.sosialurin.fo

Føroya landsbókasavn

# Bókasavnshjálpari

Á Føroya landsbókasavni er eitt starv sum bókasavnshjálpari leyst at seta 1. oktober 2006 ella skjótast gjørligt.

Umframt at hava dag- og kvøldvaktir í avgreiðsluni og annað vanligt bókasavnsarbeiði, skal tann ið settur verður, saman við øðrum, arbeiða við móttøku og avgreiðslu av avhendingarskyldu, tíðarritum o.ø.

Løn sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við próvskjølum verða at senda Føroya landsbókasavni í seinasta lagi 22. september 2006.

01-09-2006
**Føroya landsbókasavn**
J. C. Svabosgøta 16
Box 61 – 110 Tórshavn

## *Arbeiði*

***Søkt verður eftir tveimum monnum til dekkskift og annað.***

***Viðkomandi skal kunna arbeiða sjálvstøðugt***

***Talan er um tíðaravmarkað starv, frá 2. okt. til 15. des.***

***Fá meira at vita við at ringja til 21 63 64***

Sosialurin 341800

**DEKK SENTRIÐ**
***TEL 320 500***

# Hondbóltsvenjari

Søkt verður eftir hondbóltsvenjara til barna- og ungdómsdeildirnar hjá Eiðis Bóltfelag veturin 06/07.

**Nærri fæst at vita við at venda sær til Eiðis Bóltfelag á tlf. 262151 ella 258364.**

## Bróðurringurin á Havinum

**Ársfundurin 2006 verður í vikuskiftinum 8.-10. september 2006 í Missiónshúsinum Thabor í Fuglafirði, har øll eru vælkomin.**

**Fríggjadagin 8/9 kl. 20.00**
**Møti við Ingibjørn Eldevig, Fuglafirði og Kári Højgaard, Saltangará.**
**Hannis Hansen, Fuglafirði syngur.**

**Leygardagin 9/9 kl. 20.00**
**Møti við Margar Toftegaard og Poul Jacob Lundbjerg, Fuglafjørður.**
**Hans Pauli Højgaard, Rituvík o.a. syngja.**

**Sunnudagin 10/9 kl. 11.00**
**Gudstænasta við altargongd í Fuglafjarðar kirkju við Una Næs presti.**

**Sunnudagin 10/9 kl. 18.00**
**Møti við Kajberg Davidsen, Skála og Ellindur Abrahamsen, Fuglafjørður**
**Sangbólkurin av Toftum syngur.**

***Møtini eru almenn***

**Limafundur verður leygardagin 9/9-2006 við Regin Olsen, Tórshavn**

***Stýrið fyri Bróðurringin á Havinum***